## Al-qaeda søkir sjálmorðs-bumbarar í Danmark

Amerikanski felagskapurin SITE, ið hevur til arbeiðis at fylgja við í islamistiskum heimasíðum, sá fyri góðum tveimum vikum síðani omanfyri nevndu lýsing á eini heimasíðu hjá al-Qaeda. Hon er eitt forum fyri militantar islamistar, sum í seinastuni hava gjørt um seg m.a. við fólkaráni. Álopið á Danmark skal vera ein hevndaratsókn fyri muhammedstekningarnar, sum fyri tíð síðani fingu sinnini í kók. Fleiri hava longu teknað seg, og fremsta mál teirra verður at spjaða ótta í Danmark.PET, sum er danska fregnartænastan, hevur seinastu dagarnar handtikið 8 fólk, men stjórin á PET, Jakob Scharf, vil ikki vátta, at samanhangur er ímillum heimasíðunua og handtøkurnar. - Vit eru greiðir yvir hóttanirnar, og vit fylgja væl við á heimasíðuni, sigur hann við Nyhedsavisen.

## Nógv ferðafólk

Tað gongur væl hjá íslendska flogfelagnum Iceland Express, og summarið royndist so væl, at ferðafólkatalið var tað størsta nakrantíð. Í juli flutti felagið 15.000 fólk fleiri enn í juli í fjør, og í august vóru tey 12.000 fleiri enn í sama mánað í fjør. Í summar fór Iceland Express undir at flúgva ímillum Egilstaðir á Eysturlandinum og Kastrup í Keypmannahavn, og hendan farleiðin hevur roynst so mikið væl, at avgjørt er at flúgva aftur næsta summar.




*Tað gongur væl hjá flogfelagnum Iceland Express (Mynd: Morgunblaðið)*

# Bispur sita í avmarkaða tíð

**Bergur Debes Joensen er sannførdur um, at hóast hann er 41 ára gamal, so er hann til reiðar at verða umsitari og andaligur leiðari hjá Fólkakirkjuni**

BISKUPSVAL

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Hann er tann yngsti av teimum fimm valevnunum, ið eru uppstillað til biskupsvalið. Bergur Debes Joensen er nú farin til Afrika at undirvísa komandi prestum hetta til desember í Krists luthersku kirkju í Nigeria, men hann hevur avtalað við Sudanmissiónina, at verður hann valdur bispur, gongur leiðin beint heim til Føroya.

*Hví hevur tú valt at lata teg stilla upp sum bispur?*

Eg var staddur í Barentshavinum, tá eg fekk eina uppringing. Eg hevði tá ikki hugsað so nógv um meg sjálvan í hesum starvinum, men í fleiri ár havi eg hugsað nógv um týdningin, hetta starvið hevur.

- Tá ein fær eitt ytri kall, eigur man at taka tað í álvara, sigur Bergur Debes Joensen.

- Eg legði tað í bøn til Guð. Tosaði við konuna, og konan tosaði við børnini. Eftir tað varð avgerðin tikin at lata meg stilla upp.

- Tað er eisini tað at vera við til at siga sína hugsan um føroysku kirkjuna framyvir og fáa eftirkanna kirkjuskipanina, sigur prestur, sum heldur, at starvið samsvarar væl við tær andaligu royndir, hann hevur gjørt sær higartil.

Bergur Debes Joensen vísir á, at hóast hann nú sum 41 ára gamal er yngstur av biskupsvalevnunum, so hevur hann havt andaliga ábyrgd og fingið leiðsluroyndir síðan hann var 17 ára gamal, tá ið hann tók við leiðsluni í KFS í Hoydølum. Tá hann var fyrst í 20'unum, var hann nevndarlimur og seinni formaður í Eliaskirkjuni í Keypmannahavn. Sum 28 ára gamal gjørdist hann settur aðalskrivari í Kirkjuligu Heimamissiónini við tá umleið15 starvsfólkum undir sær, umframt at hann eisini var ungdómsráðgevi og blaðstjóri á Trúboðanum. 30 ára gamal gjørdist hann prestur og 34 ára gamal formaður í høvuðsstýrinum fyri Heimamissiónina.

- Eg havi altíð havt áhuga fyri leiðslu og nýggjum avbjóðingum, sigur Bergur Debes Joensen, sum hevur tikið skeið í leiðslu á Skeiðsdeplinum í Tórshavn og skeið í løgfrøði á Fróðskaparsetrinum.

- Eg haldi meg vera »ílatnan« til hetta, sigur hann og sipar til biskupsembætið.

- Kalendararnir hjá mær prógva, at síðan eg var 17 ára gamal, havi eg brúkt alla tíð og frítíð upp á leiðslu og boðan. Hvussu tað hevur gingist mugu onnur so meta um, sigur Bergur Debes Joensen.



### Bispur í avmarkaða tíð

- Um eg verði bispur, so skal eg ikki sita alt ov leingi.

Bergur Debes Joensen skýtur upp, at bispur situr tvey 5 ára skeið, og sjálvur sigur hann, at verður hann valdur, so hevur hann skriftliga lovað, at verður biskupsstarvið ikki áramálsett við lóg, leggur hann frá sær, tá ið 5 ár eru liðin við tí møguleika at lata seg stilla upp eina 5 ára setu afturat. Men verður við lóg sett longri áramálseting á biskupsskeiðið enn 5 ár, vil Bergur Debes Joensen sita tað longri. Líknandi skipanir eru í lutherskum kirkjum í londum sum Slovakia og Nigeria, vísir hann á, og spurningurin hevur eisini verið diskuteraður aðrastaðni.

*- Men er ikki vandi fyri, at politikkur so kemur í embætið?*

- Politikkur er óansæð. Allastaðni har leiðsla er, er einsamallur biskupur í Føroyum kann stívna og tømast fyri íblástur. Og ein biskupur kann eisini fara ein annan veg enn tann, hann byrjaði at ganga.

- Kirkjan er andaliga sæð hvørki biskupsins, prestsins ella fólksins, men Guds, sigur Bergur Debes Joensen.

- Við áramálsseting verður størri gjøgnumskygni við leiðslu Fólkakirkjunnar og, tað rokni eg við, størri nøgdsemi millum kirkjufólkið. Biskupur fær eftir hvørja setu lagt fyri fólkið tað, hann hevur arbeitt við, tey mál, hann hevur nátt, og tað hann ætlar, og kirkjuráðini kunnu so viðgera hetta og taka støðu til biskupin enn eina setu. Eg haldi eisum fundi við prestarnar og kirkjuráðslimirnar at havt eina frágreiðing um árið, ið fór. Kunning er góð, og hon er neyðug, sigur Bergur Debes Joensen.

### Pláss til bæði høgru og vinstru

*Hvussu ætlar tú tær at vera ein góður leiðari fyri prestarnar og kirkjuna annars í Føroyum?*

- Eitt, kirkjan treingir til, er starvsfólkapolitikkur fyri bæði lønt og ólønt, sigur Bergur Debes Joensen, og nevnir arbeiðs-, bústaðar og eftirútbúgvingarumstøður.

Hann nevnir eisini tað at loysa konfliktir í kirkjuni, og nevnir, at allir rætt kallí kirkjuni.

Spurdur, hvørji hesi eftir hansara tykki eru, sigur hann, at tað eru tey, sum eru rætt kallað samsvarandi Fólkakirkjunnar grundarlagi.

- Allir rætt kallaðir prestar skulu virða prestaarbeiðið hjá hvørjum øðrum.

- Eingin skal kroystast at gera nakað ímóti samvitskuni hjá sær.

- Breiddin skal ikki vera til vinstru, men eisini til høgru.

Tey einastu, sum sambært Bergi Debes Joensen ikki eiga at fáa prestastarv eru samkynd, tí sjálvur vil hann ikki broyta nakað, sum longu er samtykt við lóg.

- Tann, sum velur at liva í ikki at fáa prestastarv í Fólkakirkjuni, sigur Bergur Debes Joensen.

### Ímóti samkyndum prestum

*- Men vigar tað tyngri, sum Paulus sigur um samkynd enn tað, hann sigur um kvinnur í samkomuni?*

- Kvinnur og menn skulu á jøvnum føti kunna virka í samfelagnum og í kirkjuliðnum sambært Paulus eisini vera við í boðan og leiðslu, men avmarking setur hann við læruembætið. Um kvinnunnar tænastu í kirkjuni er ósemja um bíbliutulking, men tað er tað ikki á sama hátt um samkyndspurningin. Har kunnu libe-